# Vertslig lestrarstevna



*Katrin D. Apol er forkvinna fyri MFS, sum skipaði fyri lestrarstevnuni.*



*Eivør Pálsdóttir stóð fyri undirhaldinum á lestrarstevnuni við egnum sangum. Eisini las Rakel Helmsdal upp.*



*Kjartan Kristiansen helt fyri, at tey lesandi ikki skulu biðja um ov nógv, men heldur skapa nakað sjálvi.*



*Terji á Lakjuni, stjóri fyri Stuðulsstovnin, heldur, at føroyskir myndugleikar gera nógv fyri lesandi uttanlands.*

## Tey lesandi fingu ikki bert rós og tóm lyfti á lestrarstevnu í Vertshúsinum hóskvøldið

LESTRARSTEVNA

*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Karmarnir vóru eitt sindur øðrvísi enn áður.

Ein lestrarstevna á einum vertshúsi. Men karmarnir eru ikki teir ringastu. Stemningurin var sum heild rættiliga góður hetta hóskvøldið, Men hølini vísti seg eina at vera nakað lítil. Áhugin var so mikið stórur, at ikki øll fingu pláss ta løtuna, flest fólk vóru á Lestrarstevna.

Ein stevna er kanska í so nógv sagt, hóast hildið var á meira enn fýra tímar.

Ikki tað bíttasta staðið at halda eina tílíka stevnu, men nakað trongt.

Absalon Eysturoy frá MFS, sum skipaði fyri Lestrarstevnuni hóskvøldið, greiddi fyrst frá, at nøkur afturvendandi evni fóru at vera umrødd hetta hóskvøldið, men tey vóru eins og áður viðkomandi.

Høgni Hoydal, sum var tilstaðar sum bæði løgmálaráðharri og mentamálaráðharri, fekk turt uppá fyri at koma ov seint, og hetta vakti látur í kjallaranum í Vertshúsinum. Tíðanverri gjørdist fyrsti tímin heldur meira tungur enn skemtiligur. Byrjað varð sjálvandi nakað ov seint, og Elin Súsanna Jacobsen frá Fróðskaparsetrinum legði fyri. Hon greiddi frá um útbúgvingarmøguleikarnar á Fróðskaparsetrinum, men framløgan hjá henni gjørdist alt ov long og drúgv og eins og aðrar framløgur hóskvøldið, soleiðis at lestrarstevnan gjørdist fleiri tímar enn neyðugt.

### Vegleiðing og stuðul

Men kjakið vaknaði eitt sindur, tá Terji á Lakjuni legði fram um føroyskan stuðul til lesandi. Hann vísti fyrst, hvar føroyingar lósu; síðani hvønn studning føroysk lesandi fáa samanborið við hini Norðanlondini.

Samanlagt eru vit á sama støði sum hini Norðanlondini. Stuðulin at lesa uttanfyri Norðanlond er ógvuliga góður, so komu ikki og sigi, at politikararnir ikki ynskja, at tit fara út um Norðanlond at lesa, segði Terji á Lakjuni.

Hann vísti talvur, har samanberingar eru gjørdar í index og upphæddum yvir, hvat hvørt Norðanlond veitir í stuðuli.

Hesi tøl skulu takast við einum ávísum fyrivarni, men tey vísa, at føroysk lesandi eru sera væl stillaði í mun til hini londini. Serliga tá hugsað verður um, at føroysk lesandi kunnu fáa nógvan stuðul sum stuðul, men eitt nú Ísland letur allan stuðulin sum lán.

Sum føroyingur verður tú ikki roknaður sum partur av ES, hóast tú kanska hevur lisið nøkur ár í Danmark. Hetta ger, at føroyingar sjálvir skulu rinda skúlagjald uttanfyri Norðanlond, men tær fyrstu 120.000 rindar Stuðulsstovnurin.

Í eygunum hjá Stuðulsstovninum er ein føroyingur ein persónur, sum hevur búð tvey av teimum síðstu trimum árunum í Føroyum ella hevur búð helvtina av lívinum í Føroyum.

Fleiri høvdu hug at gera viðmerkingar og seta spurningar í sambandi við stuðulin til tey lesandi. Millum annað varð víst á, at tey lesandi í Danmark hava nógv fleiri sosialar fyrimunir enn tey lesandi í Føroyum.

Ein annað afturvendandi evni, sum varð umrøtt á fundinum, var, spurningurin um vegleiðing til útbúgvin fólk í sambandi at fáa arbeiði.

Holger Arnbjerg, leiðari fyri Altjóða skrivstovuna, greiddi fyrst frá, hvat arbeiðið hjá honum snýr seg um sum vegleiðari í sambandi við útbúgvingar uttanfyri Norðanlond og serliga uttanfyri Danmark.

Í sambandi við vegleiðingina nevnir Holger tveir møguleikar: Annar er at seta á stovn eina vegleiðing, sum skal halda til sentralt í høvuðsstaðnum. Ein annar møguleiki er, at vegleiðing verður latin út til útbúgvingarstovnarnar.

### Provokatión

Helt Holger Arnbjerg, at tað var tørvur á tílíkari vegleiðing, so helt Kjartan Kristiansen, stjóri fyri Menningarstovuna, júst tað øvugta.

Hann gav teimum lesandi ein skarpan gang.



*Tey lesandi sluppu ikki bara at spegla sær í lyftum, men fingu eisini nøkur hørð orð frá nøkrum viðmerkjarum, tá lestrarstevna varð hildin í vertsligum umhvørvi.*

Nú hava vit goldið fyri at sent tykkum á flog, og tað kann ikki vera meiningin, at vit skulu hava fólk til at siga tykkum, hvønn veg, tit skulu flúgva, segði Kjartan Kristiansen.

Hansara orð vaktu ónøgd millum áhoyrarnar, men slepti ikki endanum kortini. Hann segði, at trupulleikin err, at tað eru ov fá arbeiði í Føroyum, og tey, sum koma heim eftir loknan lestur, mugu berjast fyri teimum arbeiðum sum eru og mugu royna at skapa fleiri.

Tað er nógv fyri, at tit, sum hava lærdómin, skulu koma og biðja um barnagarðar og annað. Hvat so við teimum, sum ikki hava nakra lærdóm? segði ein provokerandi Kjartan Kristiansen, sum heldur ikki fjaldi, at hansara orð vóru ætla at vera provokerandi og íbirta kjak.

Næsti maður at mikrofonini, Høgni Hoydal, segði seg vera fyri ein stóran part samdan við Kjartani Kristiansen.

Høgni Hoydal, sum eisini fekk orðið aftur seinni, hevði ríkiligt at fullveldispráti við í sínum framløgum. Hann helt fyri, at útbúgvingarpolitikkur ikki var høgt raðfestur í Føroyum.

– Fólk mugu koma heim og skapa sítt egna starv. Tað ber ikki til at bíða eftir, at allar umstøðurnar eru komnar í rættlag, sigur Høgni Hoydal, sum eisini helt, at ein yrkisvegleiðing kundi komið upp á tal í samstarvið millum Stuðulsstovnin, Altjóða skrivstovuna og aðrar stovnar.

### Einstáttað kjak

Stóra evnið á lestrarstevnuni var barnaansing. MFS hevur ta støðu í hesum máli, at barnaansing er eitt týdningarmikið evni, sum hevur stóran týdning í avgerðini, ið lesandi taka um at flyta aftur til Føroya eftir loknan lestur. Tey fílast eitt nú á, at tað ikki ber til hjá teimum lesandi at skriva seg upp til barnaansing, áðrenn tey eru flutt aftur til Føroya.

Eitt politikst panel mannað við Heðini Mortensen frá Tórshavnar býráð og Kristinu Háfoss og Høgna Hoydal, sum umboða Tjóðveldisflokkin og landsstýrið. Samstundis er Heðin Mortensen tingmaður fyri Sambandsflokkin, og politiskar ósemjur tóku ríkiliga av tíðini. Ein eitt sindur óheppin samanseting við tveimum fólkum úr sama flokki.

Serliga Heðin Mortensen fekk nógvar spurningar vendar móti sær. Tórshavnar kommuna hevur ta støðu, at tað »bert« eru íbúgvar í kommununi, sum kunnu skriva seg upp á bíðilistan til barnaansing. Men lesandi kunnu skriva seg upp til grundstykki.

Heðin Mortensen greiddi frá, at Tórshavnar kommuna hevur hesa støðu útfrá einum fíggjarligum sjónarmiði.

– Men Tórshavnar kommunu hevur í desember komandi ár nøkta ansingartørvin, og tískil er eingin bíðilisti, segði Heðin Mortensen.

Kristina helt, at tey lesandi eiga at kunna skriva seg upp á bíðilistan til barnaansing, hóast tey ikki búgva í kommunui. Barnaansing er kommunumál, og tískil fáa landspolitikararnir ikki gjørt so nógv við hetta.

Hon vísti á, eins og Høgni Hoydal, at umstøður hjá teimum lesandi vóru høgt raðfest, og tað eiga at vera skaptar betri umstøður. Men konkretar ætlanir vóru ikki so nógv frammi hóskvøldið.

Eftir nógvar spurningar til Heðin Mortensen, gjørdi Høgni Hoydal enda á kjakinum, tá hann bar fram, at ansingarspurningurin nú verður loystur, og hann er við at gerast ein farin tíð. Heldur eigur at verða hugt eftir bústaðarviðurskiftunum, sum eisini eru ein stórur trupulleiki hjá serliga ungum familjum.

Hóast politisk lyft um betri tíðir, fingu tey lesandi og komandi lesandi ikki teirra ynskju uppfylt, men teirra sjónarmið vórðu í øllum førum hoyrd.

### Satsað upp á gransking

Síðsti røðarin, um vit kunna kalla tað røðarar, var Bárður A. Niclasen, Phd. lesandi á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Klokkan var farin av ellivu, tá hann skuldi greiða frá sínum virksemi, og tá var tað mesta av fólkinum eisini farið ella farin at hugsa um okkurt annað. Og tað vísti seg eisini, at eingin hevði hug at seta honum spurningar, eftir at hann var liðugur at greiða frá.

Sjálvur Bárður ein av fleiri Phd. lesandi á Fróðskaparsetrinum. Hann visti at siga, at náttúruvísindadeildin í stóran mun satsar upp á Phd. verkætlanir, sum í stóran mun eisini eru fíggjaðar av oljufeløgunum. Saknur er á einum granskingarumhvørvi í Føroyum. Eisini verður nógv gjørt við at fara út um landoddarnar, soleiðis at ein ikki endar við at sita í sínum egna dunnugarði, sum Bárður A. Niclasen tók til.

Talan var um lætta og sjarmerandi framløgu, har ungi Phd´arin var greiður yvir, at tað ikki nyttar so nógv hjá honum at fara í dýpdina á sínum egnu verkætlan um numeriska aldusimulering.

Sostatt var eitt samanumtikið livandi lestrarkvøld komið at enda. Hóast tey lesandi og komandi lesandi fingu nøkur lyfti, so var eisini nakað at hugsa leingi um til til komandi stevnir.

## Fakta

### MFS

MFS, sum skipaði fyri lestarstevnuni í Vertshúsinum, er stytting fyri Meginfelag Føroyskra Studenta. Felagið umboðar áhugamálini hjá føroyskum lesandi uttanlands eins og í Føroyum. MFS er millum annað viðurkent sum samráðingarumboð fyri føroysk lesandi.

Felagið hevur skrivstovur í Keypmannahavn og í Århus, sum hava opið nakrar tímar um vikuna.

Í altjóða høpi er MFS viðurkent sum sjálvstøðugt føroyskt felag, á jøvnum føti við onnur norðurlendsk og altjóða studentafeløg.

MFS fekk í 2002 játtaðar 200.000 krónur á fíggjarlógini. Felagið verður eisini fíggjað við limagjaldi.

## 91% lesa í Danmark

Hóast áhugin fyri at lesa uttanfyri Danmark og Norðurlond er vaksandi, so lesa framvegis nógv teir flestu føroyingarnir í Danmark.

Tøl frá Stuðulsstovninum vísa, at 910 av 992 ella góð 91% av føroyskum lesandi uttanlands lesa í Danmark. Tølini eru fyri skúlaárið 2002/2003 og vísa tey, sum hava søkt og fingið ferðastuðul. Tey, ið hava lisið longri enn seks ár, og tey, ið lesa minni enn eitt ár, fáa ikki ferðastuðul og eru tískil ikki tald við.

Tískil er talið av lesandi nakað hægri enn 992, men spurningurin er, um prosentbýtið er so nógv øðrvísi. 32 føroyingar lesa í øðrum Norðanlondum, og harav lesa 24 í Noreg.

Hálvthundrað føroyingar lósu í skúlaárinum 2002/2003 uttanfyri Norðurlond. 36, sum eisini svarar til 36% av teimum føroysku lesandi uttanlands, lesa í Stóra Bretlandi. Seks føroyingar lesa í USA, og so eru hini átta býtt millum nøkur lond, sum síggjast á talvuni her á síðuni.

Tað vil siga, at áhugin at lesa í Bretlandi er stórur í mun til onnur lond enn Danmark. Føroyingar gera eftir øllum at døma sera lítið av at lesa í eitt nú Svøríki ella Íslandi.

### 50.000 kr. hvør

Tey hálvthundrað, sum lesa uttanfyri Norðurlond, seta týðuligari spor á játtanina hjá Stuðulsstovninum enn hini. Hesi lesandi skulu nevniliga sjálvi rinda fyri skúlagjaldið. Ella rættari sagt Stuðulsstovnurin rindar við pengum úr landskassanum skúlagjaldið fyri hesar næmingar.

Terji á Lakjuni, stjóri fyri Stuðulsstovnin, segði á Lestrarstevnuni hjá MFS, at føroysku stuðulsmøguleikarnir vóru sera góðir og standa einki aftanfyri hini Norðanlondini – heldur tvørturímóti.

Hesi hálvtrýss lesandi uttanfyri Norðurlond kostaðu 2,4 milliónir skúlaárið 2002/2003. Hóast Stuðulsstovnurin rindar í mesta lagi 120.000 kr. í skúlagjaldi, so sleppur stovnurin vanliga nógv bíligari, tí í miðal kostar hvør lesandi uttanfyri Norðurlond 50.000 krónur.

**-HR**

## Hvar í útheiminum lesa føroyingar?

| | |
|---|---|
| Danmark | 910 |
| Noreg | 24 |
| Ísland | 4 |
| Svøríki | 3 |
| Finnland | 1 |
| **Norðurlond** | **942** |
| UK | 36 |
| USA | 6 |
| Italia | 2 |
| Týskland | 1 |
| Frakland | 1 |
| Holland | 1 |
| Canada | 1 |
| Australia | 1 |
| Peru | 1 |
| **Uttanfyri Norðurlond** | **50** |

**Tølini eru eftir, hvørji hava søkt um ferðastuðul og fáa stuðul. Øll lesandi hava rætt til ferðastuðul, sum taka minst eitt ár, og tískil skuldi hetta givið eina álítandi mynd av býtinum. Men fólk, sum lesa styttri enn eitt ár og fólk, sum hava longri enn seks ár, eru ikki tald við. Tølini eru fyri skúlaárið 2002/2003*

## Hvar lesa føroyingar hægri lestur?

| | |
|---|---|
| Føroyar | 500 |
| Danmark | 700 |
| Norðurlond ÷ DK | 30 |
| Uttanfyri Norðurlond | 50 |

**Hægri lestnaðurin eru útbúgvingar eftir miðnámsútbúgvingar.*